

# Nýggjárssendingin verður broytt

**Fyri at tryggja sær, at allir hyggjarar ekkaleys kunnu seta seg niður at hyggja at "Í Káta Horninum", Nýggjársaftan verður innslagið um Home-Parties flutt í aðra sending**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Nýggjárssendingina skulu øll kunna hyggja at, og tí hevur tað ongantíð verið ætlanin at senda porno ella aðrar ósømiligar myndir nýggjársaftan. Nýggjársaftan er eitt av stóru familjukvøldunum, har fólk hugna sær saman, eisini frammanfyri sjónvarpsskíggjan. Tí hevur tað altíð verið so, at familjan ekkaleys kann seta seg niður at hyggja at nýggjárssendingini, og hetta ætla vit sjálvsagt ikki at broyta. Hetta sigur Ivan Niclasen, leiðari á Mentanardeildini í Sjónvarpinum.

Hann undrast á, at sendingin – sum also enn ikki er send - í Oyggjatíðindi verður penslað út sum tað reina porno og lógarbrot. "Hetta er ein løgin skandalisering av eini sending, sum hyggjarin enn ikki hevur sæð, og hetta er als ikki í tráð við veruleikan", sigur Ivan Niclasen.

Nýggjárssendingin í sjónvarpinum fevnir um ein hóp av evnum, líka frá undirhaldi, tónleiki, make-over til matgerð. Harumframt verður eisini tosað um ymisk rák, sum eru frammi í tíðini. Eitt av hesum var um tey sokallaðu home-parties, og í hesum sambandi varð m.a. tosað við tríggjar føroyskar kvinnum um, hvat hetta var fyri nakað. Hetta var eitt sømiligt innslag, og als ikki í stríð við nakra lóg. Men vit hava valt at goyma hetta innslagið til eina aðru ferð, tí sum umrøðan hevur verið skaðar hetta innslagið hitt innihaldið í sendingini, sigur Ivan Niclasen at enda.

# Rætting til grein um Nýggjárssending

Í grein hjá mær í Sosialinum týsdagin eru ávísar orðingar komnar eitt sindur skeivt fyri. Her er fyrst og fremst talan um nýtsluna av hugtakinum "at provokera", henda orðing varð ikki nýtt av sjónvarpsmanningini og er tíanverri í andsøgn við ætlanina við sendingini. Tí hóast tann eini parturin av sendingini fæst við eitt persónligt evni, sum kynslív verður í sendingini gjørd ein miðvís roynd fyri at gera innslagið so siðiligt og lítið argandi sum til ber. Hetta er harumframt bert ein lítil partur av eini langari sending, ið nemur við fleiri ymisk rák.

Sum blaðmaðurin, ið skrivaði omanfyri nevndu grein, biði eg sjálvandi sjónvarpsmanningina umbera hesa skeivu tulking, og eitt sindur óhepnu niðurstøður, ið hava vakt so miklan ans millum mannað. Hetta var als ikki tilvitað.

**Niels Uni Dam**

# Levi fer inn á Skála

**Eftir at B36 fyri stuttum vissaði sær Hanus Thorleifsson frá Skála, hevur Levi Hanssen nú tikið túrin øvuta vegin**

Bert 17 ára gamli Levi Hanssen hevur í eini tvey ár verið roknaður sum eitt av komandi stjørnuskotunum í B36, men enn eigur hann veruliga gjøgnumbrotið tilgóðar.

Hann hevur tó verið fastur partur av hópinum seinastu tvey árini, og hevur oftani verið nýttur sum innskiftari.

Við hesum keypinum hevur Skála helst funnið sær avloysaran hjá Hanusi Thorleifssyni, eins og Levi eisini hevur prógvað, at hann er ein vandamikil harri í álopspartinum.

-mørk

Havnar Bio
kall Coca-Cola




**Narnia - Løven, Heksen og Garderobeskabet**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 29.12 | kl. 16.00 | kl. 19.00 |
| Fríggjadag | 30.12 | kl. 16.00 | kl. 19.00 |
| Sunnudagin | 01.01 | kl. 16.00 | kl. 19.00 |




**King Kong**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 29.12 | kl. 18.30 | kl. 22.00 |
| Fríggjadag | 30.12 | kl. 18.30 | kl. 22.00 |
| Sunnudagin | 01.01 | kl. 18.30 | kl. 22.00 |




**Just like Heaven**

| | | |
|---|---|---|
| Hósdag | 29.12 | kl. 22.30 |
| Fríggjadag | 30.12 | kl. 22.30 |
| Sunnudagin | 01.01 | kl. 22.30 |




**Peddersen og Findus - Nissemaskinen**

| | | |
|---|---|---|
| Hósdag | 29.12 | kl. 16.30 |
| Fríggjadag | 30.12 | kl. 16.30 |
| Sunnudagin | 01.01 | kl. 16.30 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**
**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**